

# Borandi journalistikkur

**Fjølmiðlarnir verða áhaldandi lagdir undir bert at vilja tekkjast fólki. Eingin fer í dýpdina við nøkrum sum helst, verður sagt. Tað hava vit so valt at gera nakað við og fara til verka við røttu útgerðini til borandi journalistikk.**

## Stórt og smátt um leyst og fast

**Musikklærarnir siga, at politikkarnir spæla falskt. Og vit sum hildu, at politikkarar bara hugsa um STEMMIR!!**

**Musikklærarnir burdu fingið ein bát við undirvísingar-hølum, har teir kundu siglt ímillum oyggjarnar og bygdirnar og givið børnunum tónleikafrálæru. Ein sokallaðan NÓTA-bát!**

**Politikkarnir eru DANSANDI óðir um UPPSANGIN hjá Musikklærarnum. Nú skal PÍPAN hava eitt annað ljóð. Har er okkurt sum ikki STEMMAR!**

**Stuðulsfelagið hjá AB, "Frensarnir" hava givið eitt lítið sanghefti út við slagsangum. Sanghefti eitur "KATTA-strofir"!**

**Meðan aðrar fótbóltsstjóðir tosa um "Málmaskinur", so hava vit á føroyska landsliðnum eina RÓGVU-maskinu!**

**Í seinna hálvleiki av dystinum ímóti skotum fekk sekkjapípan eitt annað ljóð!**

**Hoyr John Lawton og deiggj.**

**Føroyingar leggja danskt LAND undir seg. Byrjað verður við Roskilde Festivalinum.**

## Ístónleikur



Terje Isungset fekk sína søk fyri, táið hann spældi tónleik til eitt umhvørvistiltak í Noregi – Melting Ice – A Hot Topic. Terje er tónleikari, og hann spældi á eitt trompet-líknandi ljóðføri, sum varð gjørt úr ísi. Vónandi frystu varrarnar ikki fastar…
(Mynd: Polfoto)

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

### HB mist heitið?
Tá Italia bleiv føroyameistari í fjørsummar...
Dimmalætting

### Tað skal eg halda við
Ein útróðrarbátur stjól í gjárkvøldið ein stuttleikabát í Danmark...
... Sambært løgregluni er talan um eina rættiliga óvanliga framferð.
Portalurin

### Hvussu mann tað rigga?
Skotlandsdysturin á Strøgnum
Portalurin

### Vunnu Føroyar?
Heiðurligt tap til heimsmeistararnar
F.fo

### Maður við smakki
Leif Sørensen. Navnið ljóðar sum okkurt, ið kann etast.
Vinnuvitan.fo

### Afturvendandi tiltak fyrstu ferð
Talan er um tiltakið "Vilt í Suðuroy", sum er eitt afturvendandi tiltak í Suðuroynni, sum altso verður í Vági fyri fyrstu ferð næsta fríggjadag.
Suðurrás

**Tá tað kemur til Stykkis**
**Fólk fara úr Havnini í góðveðrinum og norðureftir, og tá tað kemur til "Stykkis", snara tey bara av og koyra til Leynar og fara oman á sandin har.**

## – Um eg fari til Føroyar?



Fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton hevur úr at gera at ferðast kring heimin og halda talur. Nú um dagarnar var hann heima í USA aftur, og har var hann til eitt hátíðarhald á Harvard lærustovninum. Lagið var gott á Clinton, og á myndini sæst, hvat hendi, tá ið onkur spurdi hann, um hann veruliga ætlar sær til Føroya at vitja…
(Mynd: Polfoto)